# Føroyingur deyður í arbeiðsvanlukku

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av suðri og útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin milum 7 og 10 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinnapartin nakað minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinnapartin nakað minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri, týsdagin minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 5 og 9 stig.

**Ein 39 ára gamal føroyingur lat lív í einari arbeiðsvanlukku í Hundige í Danmark í gjár**

ARBEIÐSVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Ein arbeiðsvanlukka, sum hendi í sambandi við umvælingar av tekjuni á Hundige Storcenter, kravdi um middagstíð í gjár eitt mannalív. Talan var um ein 39 ára gamlan føroying, sum býr í Danmark.

Knud Erik Jensen, vakthavandi hjá Midt og Vestsjællands politi, segði í gjárkvøldið við Portalin, at hendingin var so vanlukkulig, sum hon kundi vera. Hann greiddi soleiðis frá:

- Føroyski arbeiðsmaðurin og ein starvsfelagi hansara skuldu hava byggitilfar upp á sløttu tekjuna við einum krana. Fyri at verja takpappið skuldu teir leggja nakrar finérplátur undir. Tann eina plátan lá eitt sindur burturfrá, og oman á henni lógu tveir stórir blokkar úr betongi. Teir hildu, at blokkarnir lógu har fyri, at plátan skuldi ikki fara á flog, men tað vistu teir báðir arbeiðsmenninir ikki. Teir tóku so plátuna, tann fremri gekk undan og føroyingurin í aftara endanum. Í tí teir ganga fram, dettur føroyingurin niður í eitt 8 metra djúpt hol, sum plátan hevur ligið oman á. Maðurin datt niður á eitt betongdekk og fekk stóran skaða í høvdið. Hóast alt varð gjørt fyri at fáa lív í føroyingin aftur, var hann deyður, tá hann kom á sjúkrahúsið, sigur Knud Erik Jensen.

Eitt trygdarumboð á byggiplássinum hevði góðkent, at plátan lá við betongblokkunum lá og vardi holið í tekjuni. Nú skal danska Arbeiðseftirlitið kanna trygdina á byggiplássinum.

Maðurin, sum arbeiddi saman við føroyinginum, fekk viðgerð fyri skelk aftan á vanlukkuna.

Eks-daman hjá føroyinginum, sum er føroysk, og barn teirra, búgva eisini í Danmark. Tey eru kunnaði um vanlukkuna.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 10 |
| Madrid | -- |
| Róm | 16 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 19 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 31 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 34 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa. vestan fyri Skotland fer móti Íslandi.

**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið í útsynning sunnan úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/04 kl. 06⁰⁰ – 29/04 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í apríl: -8,7° - Mesti hiti máldur í apríl: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 28/04 kl. 06⁰⁰ – 29/04 06⁰⁰.
Avfallið higartil í apríl: 106 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

25. apríl – Tendring
28. apríl – Mánin næstur jørðini
1. mai – Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. apríl | 11:54 | - | 10:54 | 23:21 | 11:09 | 23:36 | 01:25 | 13:54 | 02:25 | 14:54 | 10:09 | 22:36 | 09:09 | 21:36 | - | 12:09 | 00:40 | 13:09 | 11:39 | - | 00:25 | 12:54 |
| 1. mai | 00:21 | 13:01 | - | 12:01 | - | 12:16 | 02:21 | 15:01 | 03:21 | 16:01 | 11:16 | 23:56 | 10:16 | 22:56 | 00:36 | 13:16 | 01:36 | 14:16 | 00:06 | 12:46 | 01:21 | 14:01 |
| 2. mai | 01:41 | 14:19 | 00:41 | 13:19 | 00:56 | 13:34 | 03:41 | 16:19 | 04:41 | 17:19 | - | 12:34 | 11:34 | - | 01:56 | 14:34 | 02:56 | 15:34 | 01:26 | 14:04 | 02:41 | 15:19 |
| 3. mai | 02:58 | 15:20 | 01:58 | 14:20 | 02:13 | 14:35 | 04:58 | 17:20 | 05:58 | 18:20 | 01:13 | 13:35 | 00:13 | 12:35 | 03:13 | 15:35 | 04:13 | 16:35 | 02:43 | 15:05 | 03:58 | 16:20 |
| 4. mai | 03:43 | 16:05 | 02:43 | 15:05 | 02:58 | 15:20 | 05:43 | 18:05 | 06:43 | 19:05 | 01:58 | 14:20 | 00:58 | 13:20 | 03:58 | 16:20 | 04:58 | 17:20 | 03:28 | 15:50 | 04:43 | 17:05 |